**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Blálonga. Túrur nr. 1816**
**Tíðarskeið: 11/04-25/04-2018**

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Regin Kristiansen og Sjúrður Hammer (toktleiðari).
Eygleiðari frá Vørn: Meinhard H. Gårdlykke.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad.

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna búningarstig hjá blálongu í gýtingartíðini. Umframt skulu kanningar eisini gerast av m.a. brosmu, longu, gulllaksi, stinglaksi, langasporl, trantkongafiski, havtasku og svartkalva. Nøgd, longd, vekt, kyn, kynsbúning, aldur og magar skulu kannast. Hitin við botn skal eisini skrásetast.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 100 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágslemmar. Miniloggarar vera nýttir til at máta sjóvarhita.

**Um túrin:** Byrjað var at trola norðanfyri í ein landnyrðing, og arbeiddu so vestureftir (Mynd 1). Gott veður var tað mesta av túrinum. Tó var vindurin ov nógvur tann 18/4, so vit lógu bakk í áleið 36 tímar.

Streymurin var rættiliga harður á Wyville Thomsonrygginum fyrru helvt á túrinum, og tí bleiv ikki farið suður hagar fyrr enn seinasta part av túrinum.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon *et al.* 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. juni 2018.

**Fyribilsúrslit:** 51 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 49 góðkendar. 49 ymisk fiskasløg vórðu skrásett (Talva 1). Fyribilsúrslitini geva ábending um, at tað er ikki nógv at fáa av blálongu. Lítið varð funnið av gýtandi blálongu á túrinum, men nógv var funnið av útgýttum fiski og fiski nær gýting. Hetta týðir uppá at blálonga gýtir í føroyskum øki. Magakanningarnar vístu, at blálongan fyri tað mesta hevði etið svartkjaft, men eisini nakað av rækju og høgguslokki. Ein brugda (8,3 m til longdar) og ein hákelling (uml. 5 m til longdar) vórðu fingin á Wyville Thomsonrygginum.

100 táknuprøvar av blálongu og 40 táknuprøvar av gulllaksi vórðu tiknir til ílegukanningar. Hesir verða sendir til Noregs, har kanningarnar verða gjørdar.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1816.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 12526.79 | | | 35 |
| BLÁLONGA | 4715.30 | 311 | 70 | 39 |
| GULLAKSUR | 4040.01 | 60 | 29 | 42 |
| TRANT KONGAFISKUR | 3703.73 | 60 | 16 | 41 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 2030.01 | 12 | 1 | 35 |
| HAVTASKA | 1376.42 | 109 | 19 | 35 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1357.10 | | | 27 |
| HÁKELLING | 750.00 | | | 1 |
| LONGA | 683.52 | 109 | 9 | 34 |
| STINGLAKSUR | 613.42 | 13 | 4 | 15 |
| BROSMA | 603.73 | 113 | 7 | 35 |
| LÍTLA BROSMA | 463.67 | | | 18 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 408.84 | | | 10 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 320.79 | | | 30 |
| SVARTKALVI | 278.34 | 38 | 8 | 14 |
| UPSI | 277.70 | | | 22 |
| NEVHÁVUR | 256.66 | | | 3 |
| TINDASKØTA | 254.69 | | | 10 |
| SKRUBBHÁVUR | 232.60 | | | 4 |
| SVARTKJAFTUR | 162.90 | | | 19 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 160.96 | | | 15 |
| SKØTA (BATIS) | 151.84 | | | 5 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 135.06 | | | 4 |
| KIKARAFISKUR | 133.94 | | | 4 |
| GLASKVOYSA | 99.93 | | | 8 |
| HALAHVASSA SKØTA | 74.91 | | | 4 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 74.85 | | | 4 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 70.08 | | | 9 |
| LALLA | 63.36 | | | 8 |
| SANDSKØTA | 36.55 | | | 8 |
| HVASSASPREK | 33.41 | | | 9 |
| SKRAMBUL | 30.82 | | | 4 |
| LIRI | 20.80 | | | 2 |
| HVALSPYGGJ | 20.03 | | | 4 |
| MORA | 16.74 | | | 2 |
| LOPHELIA PERTUSA | 15.59 | | | 1 |
| RÍSNA LANGASPORL | 13.82 | | | 2 |
| BLÁRIDDARI | 12.99 | | | 3 |
| FERBLETTUTA KVOYSA | 11.02 | | | 1 |
| HÝSA | 8.66 | | | 4 |
| KLINGRUSKØTA | 7.87 | | | 3 |
| REYÐKRABBI | 7.45 | | | 3 |
| HVITASKØTA | 6.76 | | | 1 |
| TOSKUR | 6.25 | 3 | 2 | 5 |
| HÁVUR | 5.31 | | | 1 |
| NEBBASKØTA | 3.62 | | | 1 |
| ECHINIDAE (IGULKER) | 2.42 | | | 1 |
| MAKRELUR | 2.18 | | | 5 |
| KLÆNASPORL | 1.18 | | | 1 |
| SKADDUR FISKUR | 0.69 | | | 1 |
| FAGURSERKUR | 0.36 | | | 1 |
| HUMMARI | 0.18 | | | 1 |
| SILVUR MURTUR | 0.02 | | | 1 |
| TILSAMANS | 36285.82 | 828 | 165 | |




**Mynd 2.** Magar kannaðir.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

<u>Sjúrður Hammer og Lise H. Ofstad</u>